## Bankakreppupakkar í Rás2

Vinnurásin á Rás2 frá týsdegnum verður endursend leygardagin klokkan 14. Hon fer m.a. at snúgva seg um teir bjargingarpakkar, sum eru á breddanum í bæði Danmark og Føroyum og í Bretlandi. Jan Müller tosar við Rúna M. Hansen, stjóri í StatoilHydro, um gongdina í Bretlandi, har bankapakkar eisini eru millum dagsins fremstu mál. Rúni starvast í London í løtuni. Leo Poulsen tosar við forstjóran í Føroya Banka, Janus Petersen um heimliga bankapakkan. Síðani er fjølbroytt skrá í sendingini um ársins leiðaradag, komandi byggimessuna og stuðulsmøguleikar hjá føroyingum til verkætlanir. Rás2 leygardagin klokkan 14.



## Obama kendar sendimenn

Barrack Obama segði í nátt, at allir partar eiga at vísa ein góðan vilja fyri at bøta um støðuna í Miðeystri, og hann heitti á Ísrael um at lata markið við Gaza-geiran upp. Beint frammanundan hevði forsetin boðað frá, at hann hevði valt fyrrverandi ST-sendiharran Richard Holbrooke og fyrrverandi semingsmannin Grorge Mitchell til sínar serligu sendimenn í Miðeystri, Afghanistan og Pakistan. Báðir eru kendir semingsmenn. Richard Holbrooke var millum annað semingsmaður í gamla Jugoslavia, og George Mitchell var við til at fáa frið í Norðurírlandi.

# Dýrari at sigla við Strandferðsluni




*Strandferðslan skal spara pengar í ár og nú leggja tey høvdið í blot fyri at vita, hvussu tað kann gerast uttan at raka ferðafólk og vinnulív óneyðuga hart*

**Strandferðslan verður noydd at seta stórar sparingar í verk í ár. Nú verður umhugsað, hvussu tað skal gerast, men tað er stórur vandi fyri, at tað fer at raka bæði vinnulív og ferðafólk**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu sparingar setast í verk á Strandferðsluni.

Tað verður neyðugt, nú tað er greitt, at Strandferðslan ikki fekk ta játtan á fíggjarlógini fyri 2009, sum ætlanin var.

Dánjal Andreasen, stjóri, sigur, at nú verður kannað eftir, hvussu sparingin kann setast í verk.

Men undir øllum umstøðum er vandi fyri, at tað fer at raka bæði ferðafólk og farm.

### Avmarkaðir møguleikar

Tilsamans kemur Strandferðslan at mangla 2,9 milliónir krónur í ár, sum antin skulu fáast til vega við sparingum ella við meirinntøkum, ella við eini samantvinning av báðum.

Men harafturat hanga 2,3 milliónir í leysari luft, sum Strandferðslan kanska eisini má finna sparingar ella meirinntøkur fyri.

Men hesar 2,3 milliónirnar er ein upphædd, sum stjórin á Strandferðsluni væntar at fáa í eini eykajáttan.

- Tað er eitt mistak í fíggjarnevndini, sum hevur gjørt, at hon var skorin burtur og tí vóna og vænta vit, at tað verður rættað og at peningurin verður játtaður.

Hesar skeivu útrokningarnar í fíggjarnevndini førdi við sær, at Strandferðslan fekk ikki 120 milliónir, sum ætlanin var, men bara 118,7.

Hendir tað ikki, skal Strandferðslan finna sparingar og meirinntøkur fyri 5, 2 milliónir í ár, sigur stjórin.

### Hække 10-15%

Í næstu framtíð fer Strandferðslan at hava fund við Landsstýrið um fíggjarligu støðuna fyri at vita, hvussu farast skal fram.

Endar tað við, at Strandferðslan fær tær 2,3, milliónirnar aftur, sum stovnsleiðarin væntar, er tað kortini undir øllum umstøðum greitt, at tað verður neyðugt at seta tiltøk í verk, sum gera raksturin hjá Strandferðsluni áðurnevndu 2,9 milliónir krónurnar bíligari í ár.

- Talan er um at spara 1,9 millión í lønarhækkingum, sum politiski myndugleikin ikki hevur lagt upp fyri í fíggjarlógini. Men harumframt er neyðugt at finna eina millión í øðrum sparingum.

Tað einasta, sum kann forða fyri, at tiltøk verða sett í verk, er at Landsstýrið eisini játtar stovninum hesa upphæddina, men tað er ikki væntandi.

Einasti máti at fáa roknistykkið at ganga upp, er at sera sparingar í verk, ella at hække inntøkurnar.

Sparingar kunnu gerast við at sigla færri túrar. Men tær kunnu eisini finnast við at seta ferðina á skipunum niður.

Og her er tað fyrst og fremst Smyril, sum hugsað verður um, tí hann er so stórur, at tað er bara har, at nøkur nevniverd sparing fæst burtur úr.

Ein annar máti er at seta prísin á ferðaseðlum upp.

- Skulu vit útvega okkum meirinntøkur upp á 2,9 milliónir, sum alt talar fyri at vit mugu, verður neyðugt at hække ferðaseðlaprísirnar 10% í miðal.

Tað merkir, at ein ferðaseðil við Smyrli, sum nú kostar 80 krónur, fer hereftir at kosta 90 krónur.

Samstundis fer tað hereftir at kosta 220 krónur at ferðast við vanligum persónbili, nú kostar tað 200 krónur.

Men ein annar máti er at hække prísin á farmi 15% í miðal.

Ein triði møguleiki er sjálvandi ein samantvinning av øllum hesum møguleikunum.

### Neyvan færri túrar

Í øllum førum hevur Dánjal Andreasen skilt, at politiskur vilji er neyvan til at lække túratalið aftur.

- Tað var tógvið stríð at fáa túratalið hjá Smyrli upp á ta støðið, sum tað nú er á og tær ábendingar vit higartil hava fingið, er, at tað er ikki politiskur vilji til, at túratalið skal lække.

At seta ferðina á Smyrli niður sparir nógva olju.

Men tað er ein møguleiki, sum Strandferðslan longu hevur brúkt.

- Smyril er settur til at hava eina tænastuferð upp á 21 míl, men tá ið veður og vindur eru til vildar, verður tikið av motorunum fyri at spara olju, tó so at siglingstíðin skal altíð halda og hvør túrur er roknaður at taka 1 tíma og 55 minuttir.

Væntandi er ikki, at ferðin verður lækkað meiri, tí so verða túrarnir við Smyrli ov drúgvir.

Men fær Strandferðslan heldur ikki hasar 2,3 milliónirnar í eini eykajáttan, sum fíggjarnevndin hevur roknað skeivt, skulu heilt aðrir bollar í súpanina fyri at fáa roknistykkið at ganga upp, sigur Dánjal Andreasen.

# Raka vinnulívið sum minst

**Nú sparingar skulu setast í verk á Strandferðsluni, hugsar stjórin nógv um, hvussu vinnulívið í Suðuroy kann sleppa so snikkaleyst sum gjørligt**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at hendan næsta tíðin skal brúka at eina nágreiniliga viðgerð fyri at vita, hvussu tey skulu spara ella finna meiri inntøkur fyri at raka ferðafólk og vinnulív minst møguligt.

Sum tað sæst í greinini omanfyri, skulu sparingar setast í verk á Strandferðsluni.

- Tað verður mest ferðafólk og vinnulív í Suðuroy, sum hetta fer at raka og tískil skulu tiltøkini, sum verða sett í verk, verða serstakliga væl umhugsað fyri ikki at raka privata brúkaran og vinnulívið í Suðuroy harðari enn allar hægst neyðugt, sigur stjórin á Strandferðsluni.

- Vit vilja helst sleppa undan at hække prísirnar, men spurningurin er bara, hvat vit verða noydd til, leggur hann afturat.

### Fastur oljuprísur

Ein máti at fáa játtanina at halda, er sjálvandi at oljan lækkar alsamt, men er vandamikið at dúva upp á tað og at arbeiða upp á ein væntaðan vinning, tí lækkar oljan ikki, mugu enn størri inntriv gerast seinni í ár.

Men í hesum sambandi roynir Strandferðslan nú at fáa eina avtalu við oljufelagið um ein fastan prís restina av árinum, so at stovnurin veit akkurát, hvussu stórar oljuútreiðslurnar verða.

- Nú sveiggini í oljuútreiðslunum eru so stór, hevði tað verið ein stór hjálp í arbeiðnum, at leggja raksturin til rættis, tí sum er, broytist oljuprísurin so nógv, at tað er sera tórført at meta um frammanundan, sigur Dánjal Andreasen.